# Manglandi samskifti um tunnilstrygd

**Tað er manglandi samskifti millum Brunaumsjón Landsins og Vágatunnilin, sum hevur fingið leiðaran á Brunaumsjónini at biða fútan kanna, um Vágatunnilin yvirhøvur kann vera opin**

TUNNILSTRYGD
*Edvard Joensen*



*Brunaumsjón Landsins hevur góðtkent alla trygdarútgerðina, sum er sett upp í og við Vágatunnilin, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri Vágatunnilin*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Væntandi samskifti millum Vágatunnilin og Brunaumsjón Landsins hevur gjørt, at leiðarin á Brunaumsjónini nú hevur biðið fútan kanna, um trygdarviðurskiftini í Vágatunlinum loyva, at tunnilin yvirhøvur er opin. Stjórin fyri Vágatunlinum undast á ta støðuna, tí honum kunnugt hevur Brunaumsjónin góðkent alla trygdarútgerð og rakstrarhondbók hjá Vágatunlinum

Petur á Lava Olsen, leiðari á Brunaumsjón Landsins, sigur, at tað, sum serliga hevur gjørt, at hann hevur vent sær til fútan, er, at hann ikki kennir tær mannagongdir, sum galdandi eru í Vágatunlinum. Eitt nú hvussu rakstrarhondbókin há Vágatunlinum sær út. Hvør skal ansa hvørjari trygdarskipan, Hvør skal siga hvørjum frá, um eitthvørt ikki riggar, sum tað skal. Og hvør skal seta tey neyðugu tiltøkini í verk, tá okkurt er galið.

– Vit høvdu eitt dømi herfyri, tá vatn fleyt út á koyribeytina. Tað vísti í hvussu er, at har var ikki alt, sum riggaði nøktandi, vísir Petur á Lava Olsen á.

## Skilir ikki málið

Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri Vágatunlinum, undrast á, hvat Brunaumsjón Landsins vil við hesum málinum nú.

– Brunaumsjónin hevur góðkent alla ta trygdarútgerð, sum brúkt verður í Vágatunlinum. Og vit hava víst teimum rasktrarhondbók, og hvat nú kann vera aktuelt, sigur hann.

Stjórin fyri Vágatunlinum sigur, at hann skilir ikki rættiliga, hvat Petur á Lava Olsen vil við hesum málinum. Sær vitandi, sigur Dávur Reinert Hansen, hevur samstavið verið gott við allar partar, sum hava ábyrgd av trygdini í vágatunlinum. Tað verið seg Brunaumsjón Landsins og sløkkiliðini báðu megin tunnilin. Tað vil siga í Kvívík og Miðvági/Sandavági.

Allar seinasta hond verður i løtuni løgd á arbeiðið í Vágatunlinum. NCC eftirkannar rivur og tílíkt, sum bøtast skal um, og boðað er frá, at tað arbeiðið verður endaliga liðugt tann 8. sept. Hetta hevur Brunaumsjón Landsins eisini fingið at vita, sigur hann, men haðani hevur Vágatunnilin einki frætt aftur.

– Eg havi biðið um ein kunnandi fund við Brunaumsjón Landsins saman við Fiskimálaráðnum, sum Brunaumsjónin nú er løgd undir, men haðani er einki frætt aftur, sigur Dávur Reinert Hansen. Vit halda okkum hava gjørt ein góðan innsats og undrast tí á, at soleiðis verður farið út við hesum beint nú.

Petur á Lava Olsen sigur, at hetta, sum nú er komið upp um fráboðan til Fútan, er ikki nakað spildurnýtt mál. Tað er nakað síðan, hann sendi áheitanina, sigur hann. Men hevur enn einki frætt aftur frá fútanum.

Hann váttar, at Brunaumsjónin hevur góðkent ljós, elskáp og so framvegis av trygdarútgerð, sum er í Vágatunlinum, sum Dávur Reinert Hansen eisini vísir á. Men tað er ikki nokk, at teir ymsu lutirnir hvør í sínum lagi eru í ordan og rigga. Tað, sum umráðandi er, er at teir rigga saman og undir teimum umstøðum, teir skulu brúkast, vísir hann á.

– Eitt er at seta upp. Eitt annað er at gera endaligt eftirlit. Øll skipanin skal eftirsýnast, tá hon er liðug. Og tað úrslitið kenni eg ikki, sigur Petur á Lava Olsen, leiðari á Brunaumsjón Landsins.

## Øðrvísi enn aðrir tunlar

Spurdur um hví hann vísir á manglandi trygd í Vágatunlinum fram um aðrar tunlar, sum í rættiliga nógv longri áramal hava verið brúktir, uttan at tey trygdarkrøv, nú verða sett Vágatunlinum, eru í lagi, sigur Petur á Lava Olsen, at tað er tí, at Vágatunnilin er øðrvísi enn aðrir føroyskir tunlar á fleiri økjum.

Eitt nú er talan um ein undirsjóvartunnil, sum beinanveg ger hann øðrvísi í skapi enn aðrar tunlar.

Undirsjóvartunnilin hevur stórt hall, sum ger, at eitt nú roykur uppførir seg heilt øðrvísi, enn hann ger í vatnrøttu tunlunum. Eisini ber til at rulla ein bil út úr einum vatnrøtum tunli. Men tað ber illa til í undirsjóvartunlinum við brattari brekku.

– Men tað er ikki soleiðis at skilja, sigur Petur á Lava Olsen, at teir tunlarnir, sum Landsverkfrøðingurin umsitir, eru friðaðir. Tær skipanir, har eru, skulu eisini dagførast, og tað arbeiðið er farið í gongd.

Hann nevnir til dømis, at Vágatunnilin á stórum strekkjum er taktur við skúmtilfari, sum eitt tunt lag av betongi liggur uttaná. Tað skal eisini kannast, um tað er nóg trygt.

Tá so víst verður á, at Norðskálatunnilin er klæddur við júst sama tilfari uttan betonglag uttaná, játtar Petur á Lava Olsen, at so er, men sigur, at har er bert talan um eitt nógv styttri strekki enn í Vágatunlinum. Men tað skal eisini takst upp, sigur hann.

Tað er rætt, at gomlu tunlarnir hava verið brúktir í nógv ár, uttan at tey trygdarkrøv, nú verða sett, eru lokin. Men nú tosa vit um ein nýggjan tunnil, sum er gjørdur, eftir at vit kenna trygdarkrøvini, sum nú eru galdandi. Og so skulu tey bara vera í lagi. Tá so alt er í lagi og góðkent, verður tunnilin sagdur klárur at ferðast ígjøgnum. Sum er hevur hann bara fyribilsloyvi.

Tunlarnir hjá Landsverkfrøðinginum skulu eisini lúka tey til einahvørja tið galdandi trygdarkrøv. Tann uppstrammingin er í gongd, og tað verður ein stór uppgáva hjá Landsverkfrøðinginum at fáa til vega pening til tað, sigur Petur á Lava Olsen, leiðari á Brunaumsjón landsins.

Hvat fer at henda eftir 8. september, um so verður, at krøvini til Vágatunnilin ikki eru uppfylt, veit Petur á Lava Olsen ikki. Men hann fer so at taka eitt álvarsligt prát við leiðsluna fyri Vágatunnilin, sigur hann.



*Vágatunnilin er útgjørdur við bæði neyðtelefon og eldsløkkjarum, sum gevur munandi betri trygd enn aðrir føroyskir tunlar*
*Mynd: Edvard Joensen*

Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, til Bjarna Djurholm:

# Gevst við at spæla solo

**Høgni Hoydal er alt annað enn fegin um framferðarháttin hjá Bjarna Djurholm. Hann heldur málið er best tænt við at enda á landsstýrisborði aftur, so málið ikki dettur niðurfyri, tí tað er tað ov týdningarmikið til, sigur formaður Tjóðveldisfloksins.**

NýGGJA ARBEIÐSMARKNAÐARLÓG
*Páll Holm Johannesen*


*Vit hava fleiri ferðir á landsstýrisfundi heitt á Bjarna Djurholm um at fara hovliga fram í málinum, tí annars kundi hann skjótt fáa trupulleikar, og tað er nú júst tað, sum er hent, sigur Høgni Hoydal.*
*Mynd: Savnsmynd*

Virkandi løgmaður, Høgni Hoydal, er alt annað enn fegin um framferðarháttin hjá Bjarna Djurholm í málinum um nýggja lóg um seming og loysn á trætum á arbeiðsmarknaðinum. Hann slær fast, at Tjóðveldisflokkurin er fullkomiliga samdur í, at broytingar skulu fremjast á arbeiðsmarknaðarøkinum, men flokkurin heldur, at málið hevur fingið ein serstakliga óhepnað byrjan.

– Vit hava fleiri ferðir á landsstýrisfundi heitt á Bjarna Djurholm um at fara hovliga fram í málinum, tí annars kundi hann skjótt fáa trupulleikar, og tað er nú júst tað, sum er hent, sigur Høgni Hoydal.

Hann heldur, at tað er beinleiðis óheppið, at landsstýrismaðurin er farin til fjølmiðlarnar at siga sína persónligu hugsan, áðrenn ferð er komin á veruligu viðgerðina av málinum. Hann vísir á, at Bjarni Djurholm við tí framferðarháttinum ger tað alsamt torførari at fáa ein ordiliga viðgerð av málinum, sum tað hevur uppiborið

Høgni Hoydal sigur eisini, at Bjarni Djurholm ber beinleiðis ósannindi fram, tá hann sigur, at Tjóðveldisflokkurin á landsstýrisfundi hevur bundið seg til, at flokkurin er samdur við ætlaninum við lóggeva fyri føstum gerðarrætti hjá landsstýrismanninum. Tjóðveldisflokkurin hevur bert givið landsstýrismanninum grønt ljós at halda á við viðgerðini av málinum.

Virkandi løgmaðurin vísir á, at Bjarni Djurholm kann ikki halda Tjóðveldisflokkin til svars fyri síni persónligu hugsan á økinum, og sigur í sama viðfangi, at á landsstýrisfundi verður ikki nakað endaliga samtykt, sum vit kenna tað í løgtinginum, men talan er heldur um kunnandi fundir, har lagt verður fram, hvussu tey ymisku málini ganga.

## Koyrir sjálvur

Høgni Hoydal ásannar, at hann beinleiðis er troyttur at framferðarháttinum hjá Bjarna Djurholm. Hann tekur Postverkið, Landbúnaðarmálið og Framtaksgrunnin um mál, har landsstýrismaðurin í vinnumálum beinleiðis brýtur avtalur, og at hann spælir fullkomiliga solo, og hann biður landsstýrismannin alt fyri eitt gevast við tí.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum sigur, at málið um arbeiðsmarknaðin er av so stórum týdningi, og tað má fáa eina virðiliga viðgerð. Hann heldur, at málið í løtuni er stórliga merkt av hvørjum hugsanum, Bjarni Djurholm sjálvur hevur, og ikki hvørja áskoðan samgongan hevur.

– Bjarni Djurholm er landsstýrismaður fyri alla samgonguna, fyri Føroya land og politisku skipanina, og ikki bara seg sjálvan, og tað átti hann, at lagt sær meira í geyma, sigur ein avgjørdur Høgni Hoydal.

## Á landsstýrisborð aftur

Høgni Hoydal heldur einastu loysnina á málinum verða, at málið aftur kemur fyri á landsstýrisfundi..

– Málið má fyri alt í verðini ikki detta niðurfyri, tí tað er greiður politiskur vilji fyri at fremja broytingar á økinum, og hóast tað er greitt, at øll ikki verða samd, ikki minni týdningarmikið er tað, at vit hava ein dialog við partarnar á arbeiðsmarknaðinum um uppskotið, sigur Høgni Hoydal at enda.

Landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm:

# Heldur fast við landsstýrissamtyktina

**Torbjørn Jacobsen og Hergeir Nielsen eru hoknaðir undir trýsti frá einstøkum persónum, sum ikki ynskja ein fastur gerðarrættur gert veruleiki. Hann vísir enn einaferð á, at søgan vísir, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki megna at koma til sættis um ein fastan gerðarrætt, og tí er neyðugt við lóggeving**

ARBEIÐSMARKNAÐARMÁL
*Páll Holm Johannesen*


*Bjarni Djurholm skilir ikki, at Torbjørn Jacobsen bert fyri fáum mánaðum síðan var heitur talsmaður fyri lóggeving, og at hann nú brádliga hevur broytt áskoðan.*
*Mynd: Savnsmyn*

Tað tók sína tíð. Seinastu vikurnar hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum keglast dúgliga um nýggja uppskotið hjá Vinnumálaráðnum um fastan gerðarrætt og víðkaðar heimildir til Semingsstovnin.

Landsins politikkarar hava verið heldur friðarligir, men hósdagin brast so fyri nevið. Báðir tjóðveldistinglimirnr Torbjørn Jacobsen og Hergeir Nielsen, søgdu seg ikki ganga við til, at landsstýrismaðurin ætlar at lóggeva á arbeiðsmarknaðarøkinum, uttan at partarnir sjálvir eru samdir um at fáa ein fastan gerðarrætt.

## Landsstýrissemja

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum skilir ikki tjóðveldistingmenninar, tí eitt samlað landsstýrið er komið ásamt um, hvussu uppskotið um nýggja arbeiðsmarkaðarlóg skal fara fram.

– Stutt undan uppskotið varð sent feløgunum til hoyringar, vóru allir landsstýrismenn samdir um mannagongdina, og at tað varð arbeitt víðari við málinum, men nú koma Torbjørn Jacobsen og Hergeir Nielsen sum ketta úr høvdatrogi, sigur Bjarni Djurholm.

## Hoknaðir undir trýsti

Spurdur, um hví, at tjóðveldistingmenninir brádliga ganga uppskotinum ímóti, svarar landsstýrismaðurin, at teir er hoknaðir undir trýsti frá einstøkum persónum. Bjarni Djurholm fortelur, at Torbjørn Jacobsen bert fyri fáum mánaðum síðan var heitur talsmaður fyri lóggeving, og tískil skilur hann ikki, hvussu hann brádliga hevur broytt áskoðan.

Bæði Hergeir Nielsen og Torbjørn Jacobsen vístu á, í ávikavist Sjónvarpi Føroya og Útvarpi Føroya, at semja má finnast millum partarnar sjálvar, áðrenn nøkur lóggeving kemur á økinum, og ikki ber til at lóggeva yvir høvdinum á pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, heldur framvegis fast við ætlanini um at lóggeva, tí óteljandi royndir hava víst, at partarnir kunnu ikki semjast um fastan gerðarrætt. –Tað hava royndir verið gjørdar í 1998, 2000 og 2001, men alt dettur niðurfyri, og summa sumarium má vera, at har kemur einki burturúr, og tí má lóggeving til, greiðir landsstýrismaðurin í vinnumálum frá.

## Heldur fast

Bjarni Djurholm hevur kortini ongar ætlanir um at sleppa málinum. Hann leggur dent á, at hann ætlar bara at fylgja landsstýrissamtyktini, og so leingi eingin onnur landsstýrissamtykt fyriliggur, er hann noyddur at halda fast við semjuna hjá landsstýrinum.

Landsstýrismaðurin er kortini ikki yvirraskaður av gongdini í málinum. Hann má bara ásanna, at ferð eftir ferð roynir Vinnumálaráðið at arbeiða við uppskotum, men tað endar altíð við einum frammaná.

Bjarni Djurholm sigur at enda, tað er ógvuliga harmuligt, at tinglimir eru noyddir finna upp á eina grundgeving fyri at seta kílar í arbeiðið hjá Vinnumálaráðnum, og sum møguliga hevur við sær, at málið ikki fær tað viðgerð, tað hevur uppiborið.